# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Hví Blair er rætti maðurin fyri Europa

Um Lissabon sáttmálin sum ætlað kemur í gildi komandi ár, so skal Europa velja ein forseta at standa á odda fyri ES og vera andlitið mótvegis útheiminum. Ein kandidatur, sum hevur verið nevndur, er fyrrverandi bretski forsætismálaráðharirin Tony Blair.

Hetta átti at verið góð tíðindi fyri ein og hvønn, sum ynskir sær eitt ES við einum karismatiskum oddamanni, sum kann føra eitt samt ES frameftir á heimspallinum. Tá Blair vann sín stórsigur í Bretlandi í 1997, eftir 18 ára konservativt stýri, kom nýtt lív í bretskan politikk. Har man hevði havt John Major sum fullkomuliga óinspirerandi og grátt eftirspæl til Thatcher, kom Blair inn á pallin og fekk Bretland inn í 21. øld við sjálvsáliti og framburði. Blair vann sum tann einasti Labour forsætismálaráðharrin nakrantíð, trý parlamentsval á rað. Blair effektin, sum Bretland fekk í 1997, er júst tað, sum ES hevur brúk fyri.

Tó sær ikki út til, at hann fær undirtøku í hansara royndum at gerast ES forseti. Sosialistiski bólkurin í ES, við tí í statsmanshøpi avmarkaða Poul Nyrup Rasmussen á odda, hevur meldað alment út, at hann vil fara eftir uttanríkismálum í ES og ikki ES forsetasessinum.

Fleiri europeiskar røddir hava verið ímóti einum og hvørjum bretskum kandidati til oddasessin, tí at Bretland hevur fasthildið pundið og ikki er við í Euro samstarvinum. Hetta hevur tó ikki verið tað fremsta argumentið móti Blair. Flestu ábreiðslurnar móti Blair hava verið í samband við hansara stuðul til Irak kríggið og til Bush.

Søgan fer at vísa, um Blair fór skeivur viðvíkjandi Irak, men tey, sum halda, at stuðulin hjá Blair til Irak kríggið, verður mintur í USA sum stuðul til Bush, taka feil. Blair verður hinumegin Atlantshavið sæddur sum ein allieraður hjá USA og ikki hjá Bush. Óansæð um forsetin í USA eitur Bush ella Obama, so fer amerikanska stjórnin at minnast tætta bandið hjá Blair til USA, og hetta kundi gagnað ES, um Blair gjørdist ES forseti.

Fremsta argumentið fyri at velja Blair til ES forseta er, at hann er atlanticistur. Tony Blair trýr sum atlanticistur uppá, at Europa og USA eiga at finna felags loysnir fyri heimspolitiskar avbjóðingar – tað verði seg búskaparligar ella hernaðarligar. Ein atlanticistur er tað, sum ES hevur tørv á. Ongantíð meir enn nú, tá USA hevur Obama á odda, og heimurin stendur frammanfyri risaavbjóðingum á búskaparliga økinum og øðrum økjum. Tiverri sær tað út til, at tað er júst tað faktum, at Blair er atlanticistur, sum kemur at forkoma honum møguleikan at gerast ES forseti.

Ístaðin fyri ein statsmann sum Blair, sær út til, at ES fer at velja onkran anonyman og í heimshøpi líkagyldigan belgiara ella luxembourgara, sum fer at fella í eitt við tapetið í Bruxelles, til ES forseta. Vit kenna slagið. Ein ókontroversiellan eurocentriskan persón, sum øll hava gloymt eftir eitt valskeið ella tvey. Spell fyri ES og spell fyri heimin.

**Sosialurin**

## Aftur ein sigur fyri Klaksvík og føroyska samfelagið

**JÓGVAN VIÐ KELDU**



JFK er sama altjóðahugsandi fyritøkan, sum hon søguliga hevur verið, og er framvegis av størsta týdningi fyri Klaksvík og harvið alt tað føroyska samfelagið.

Eg minnist tíðina í 1993-94, tá ið kreppan leikaði í í føroyska samfelagnum. Danir meiri ella minni tóku um stýrisvølin. »Mølposen« var dagliga í kjakinum, og danir saman við øðrum ynsktu, at føroysku flakavirkini, skuldu savnast í ein sentralan stovn.

Tá tóku vinnan, fakfeløgini, Norðoya Sparikassi, skiparar, maskinmeistarar og aðrir í Klaksvík og Norðoyggjum seg saman, og vildu ikki lata virki og skip av hondum inn í sentralt stýrdan stovn, men sjálvi settu sær fyri at loysa uppgávuna.

At vera borgarstjóri við tílíkum menniskjaligum tilfeingi var ikki bara ein frægd, men tað kendist bæði trygt og fjálgt.

Soleiðis gekk hetta í eini fimtan ár, har Klaksvík átti ein stóran part av føroyska útflutninginum, og virkir og skip mettaðu ótal av føroyskum munnum.

**Aðrir íleggjarar og vinnan í Klaksvík**

Eftir at Norðoyatunnilin lat upp, hava ikki so fáir vinnulívmenn úr øðrum pørtum í landinum sæð sær stórar møguleikar at gera íløgur í virkir og handilsskap í Klaksvík, sum hevur givið gylt fyri allar partar.

Vinnulívsøgan í Føroyum hevur altíð endurspegla upp- og niðurgondir eins og vinnulívið í øðrum londum, kanska heldur meiri viðkvom, meðan almenni sektorurin bara hevur lagt meiri gjøld á fólkið, tá peningur restaði í.

Nú er so stundin komin hagar, at JFK letur Kósavirkið uppaftur eftir eitt ára steðg. Kanska hevur verið bíðað eftir rætta prísinum, eisini kann henda, at hetta hevur verið ein búningartíð í einum so stórum átaki.

At bæði JFK, tvinnir útlendskir keyparar, Norðoyagrunnurin, sum Norðoya Sparikassi varðar av, og Føroyagrunnurin frá 1971, sum er ogn klaksvíkinga, upparbeiddur við aktivum úr Klaksvík og bara úr Klaksvík frá fyritøkuni JFK, er saman um hetta átakið, er sera áhugavert og sterkt. - Føroya Banki hevur altíð verið hollur í Klaksvík.

**Sterk vinnulívsfólk**

JFK er sama altjóðavirkandi fyritøkan, sum hon søguliga hevur verið og, at Kósavirkið nú letur uppaftur, er ikki bara ein sigur fyri Klaksvík og Norðoyggjar men fyri alt Føroya land. Eisini at hetta eru roynd vinnulívsfólk!

Eg má siga, at eg saman við mongum fegnist um tíðindini, havi fylgt við gongdini í mong, mong ár. Tí fari eg at ynskja Hanusi Hansen við fylgi hepna hond og Harrans signing.

At vit hava so sterk og fjøltáttað vinnulívsfólk og fakfeløg í Klaksvík, ið skilja álvarsemið í føroyskari framleiðslu og útflutningsátøkunum, er okkara bjarging!

## Takk, Birgar Johannesen!

**FRÍÐÁLVUR JENSEN**



**- gott, at vit eiga fólk, sum seta søguna í hásæti, tí uttan hesa hava vit ikki nakran samleika at byggja víðari á**

Eg setti mær fyri at fara í Sjónleikarhúsið at ogna mær bókina *»Havnarmyndir – fyrr og nú«*, sum vísir á tey ymsu søguligu støðini í Havnini, sum tey hava tikið form – hesi seinastu fjøruti árini – okrastaðni eldri.

Tá eg blaðaði gjøgnum bókina, festi eg meg serliga við myndina úti á Landavegnum, sum veruliga er ein ímynd av teirri samfelagsligu menningini, sum vit hava sæð – hesi seinastu mongu árini.

At vit eru í hesi støðugu menningini er bert tekin um, at vit eru vitni til eina menning, sum okkara eftirkomarar fara at njóta gott av.

Tað hevur tú við seinastu bókini, sanniliga, gjørt okkum varug við.

Undanfarnu bøkurnar: *»Havnin 1900 til 1939 og Havnin 1940 til 1969«* eru sanniliga ONKI undantak í so máta, so eg vóni, at vit fara at síggja enn fleiri avrik, sum geva okkum eina ábending um, at vit støðugt førka okkum, og vit **IKKI** eiga at gloyma tey, sum løgdu lunnar undir okkara samfelag.

Takk fyri, Birgar!

## Leygardag og leygardagin merkja ikki tað sama

**KRISTIN POULSEN**



Onkuntíð hevur tú varhugan av, at onkur, sum fær arbeiði í útvarpinum, skal gera vart við seg málsliga, sum ikki hevur gávurnar til tað. T. d. heldur onkur, at nú skulu allar tíðarmerkingar verða óbundnar, men so einfalt er tað ikki. Sigi eg, at leygardag svimji eg, so svimji eg hvønn leygardag, men sigi eg, at leygardagin svimji eg, so merkir tað, at eg svimji nú leygardagin.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.